NORDIKLÍV

# Tryggingartreytir fyri Bólkalívstrygging

**Tryggingartreytirnar eru galdandi frá 1. mars 2017 og koma í staðin fyri treytirnar, ið komu í gildi 1. september 2016**

## § 1. Tryggingaravtalan

Stk. 1. Tryggingaravtalan fevnir um bólkalívsavtaluna og niðanfyristandandi tryggingartreytir.

Stk. 2. Frávik til tryggingartreytirnar kunnu gerast við ásetingum, ið eru nevndar í bólkalívsavtaluni, og sum eru avtalaðar millum NordikLív og tryggingartakaran, sambært § 3 d.

Stk. 3. Tryggingaravtalulógin er galdandi sum ískoyti til avtalugrundarlagið, um ásetingarnar í tryggingaravtaluni ikki víkja frá lógini.

## § 2. Bólkalívsavtalan

Stk. 1. Bólkalívsavtalan inniheldur tær yvirskipaðu ásetingarnar um tey tryggjaðu/bólkalimirnir, teirra innliman í og útliman úr skipanini, og hvat tryggingarfulnaðurin fevnir um v.m..

Stk. 2. Bólkalívsavtalan kann fevna um fylgjandi:

a) Fulnaður um bólkalimurin doyr, sambært § 7.
b) Fulnaður um bólkalimurin gerst óarbeiðsførur, sambært §§ 8 og 9.
c) Fulnaður um bólkalimurin fer frá við eftirløn vegna aldur, sambært § 10.
d) Fulnaður um hjúnafelagi bólkalimsins doyr (hjúnafelagafulnaður), sambært § 11 A.
e) Fulnaður um bólkalimurin fær bráðsjúku, sambært stk. 3.
f) Fulnaður um hjúnafelagi bólkalimsins fær bráðsjúku, sambært stk. 3 og § 11 B.
g) Fulnaður um børn bólkalimsins fáa bráðsjúku, sambært stk. 4 og § 3 b.
h) Fulnaður um børn bólkalimsins doyggja, sambært stk. 4 og § 3 b.
i) Fulnaður um børn bólkalimsins fáa diabetes (sukursjúku) slag 1, sambært stk. 4 og § 3 b.

Stk. 3. Bráðsjúka gevur fulnað sambært ásetingunum hjá NordikLív um: **"Fulnaður fyri ávísar bráðsjúkur"**, ið verður útflýggjað sum ískoyti til bólkalívsavtalur, ið fevna um bráðsjúku.

Stk. 4. Fulnaður í sambandi við bráðsjúku hjá børnum, fulnaður um børn doyggja og fulnaður í sambandi við diabetes salg 1 hjá børnum gevur fulnað sambært ásetingunum hjá NordikLív um: **"Fulnaður fyri ávísar bráðsjúkur hjá børnum"**.Tryggingartreytirnar verða útflýggjaðar sum ískoyti til bólkalívsavtalur, ið fevna um fulnað fyri bráðsjúku hjá børnum.

## § 3. Týdningurin av málberingum nýttar í tryggingar-avtaluni

*a) Børn fevnd av barnaupphædd/barnaveiting*

Egin børn og ættleidd børn bólkalimsins umframt egin børn og ættleidd børn hjúnafelagans. Javnsett við hesi eru egin børn og ættleidd børn hjá sambúgvanum, um treytirnar í § 4 eru loknar.

Tað er ein fortreyt, at bólkalívsavtalan hevur ásetingar um útgjald av barnaupphædd/barnaveiting.

Rættindini til barnaupphædd/barnaveiting fyri eitt barn, ið ikki er egið barn ella ættleitt barn hjá bólkaliminum, fellur burtur við sundurlesing ella hjúnaskilnað, ella tá eitt samlív fevnt av § 4 er roknað sum slitið.

Rættindini verða ikki ávirkaði av, at hjúnabandið/samlívið er endað sum avleiðing av deyða. Rættindini til barnaupphædd/ barnaveiting undir einum møguligum hjúnafelagafulnaði koma í gildi og fara úr gildi sambært ásetingunum í § 11 A.

*b) Børn fevnd av fulnaði í sambandi við bráðsjúku, deyða og diabetes slag 1*

Egin børn og ættleidd børn bólkalimsins umframt egin børn og ættleidd børn hjúnafelagans/sambúgvans.

Tað er ein fortreyt, at bólkalívsavtalan hevur ásetingar um útgjald av upphædd fyri bráðsjúku hjá børnum ávikavist fulnað í sambandi við deyða barnsins og/ella fulnað í sambandi við diabetes slag 1 barnins.

Tað er ein treyt fyri fulnað fyri egnu børn ella ættleiddu børn hjúnafelagans/sambúgvans, at hjúnafelagin/sambúgvin og barnið liva saman við bólkaliminum á felags bústaði, tá sjúkuavgerðin fyri barnsins bráðsjúku verður tikin/barnið doyr, og hava gjørt tað í minsta lagi 6 mánaðir, áðrenn sjúkuavgerðin varð tikin/barnið doyði.

Rættindini til útgjald falla burtur við sundurlesing ella hjúnaskilnað.

*c) Tryggjaði*

Bólkalimurin fyri hvørs lív og heilsu tryggingin verður stovnað, ella hansara/hennara hjúnafelagi/sambúgvi ella barn, um so er, at tað er avtalað, at tryggingin fevnir um hesi.

*d) Tryggingartakarin*

Tað virki, tann felagsskapur, tað yrkisfelag ella líknandi, sum NordikLív hevur gjørt tryggingaravtaluna við.

NordikLív kann við gildi gera avtalu við tryggingartakaran fyri bólkalimirnar um allar spurningar viðvíkjandi tryggingaravtaluni. Einstaki bólkalimurin, sambært punkt f, hevur tó rætt til at gera avtalu um ávísar ásetingar við NordikLív um njótunartilskilan.

*e) Tryggingartíðin*

Fevnir um tíðarskeiðið frá at bólkalimurin og tey, ið eru tryggjaði saman við bólkaliminum, ávíkavist hjúnafelagar/ sambúgvar/børn verða innlimaði í bólkalívsavtaluna, og til tey verða útlimaði úr henni aftur sambært ásetingunum í tryggingaravtaluni, ella sum avleiðing av at bólkalívsavtalan endar ella hvør fyri seg sambært avtalu.

*f) Bólkalimirnir*

Teir persónar, sum sambært bólkalívsavtaluni millum NordikLív og tryggingartakaran eru innlimaðir í bólkalívsavtaluna sum eigarar av tí avtalaða tryggingarfulnaðinum.

*g) Samlív/sambúgvi*

Fevnir um bæði samlív millum persónar av sama kyni og samlív millum persónar av hvør sínum kyni, um eingin hjúnalagsforðing kann staðfestast.

*h) Hjúnaband/hjúnafelagi*

Fevnir harumframt um skrásett parlag/skrásettan felaga.

## § 4. Samlív í sambandi við hjúnafelagafulnað/barnaupphædd/barnarentu

Stk. 1. Sambúgvi bólkalimsins er fevndur av hjúnafelaga-fulnaðinum í bólkalívsavtaluni, og egnu børn og ættleiddu børn sambúgvans eru fevnd av barnaupphæddini/barnaveitingini í bólkalívsavtaluni, um treytirnar í stk. 2 eru loknar:

Stk. 2. Sambúgvin skal liva saman við bólkaliminum á felags bústaði og 1) vænta, hava ella hava havt eitt barn saman við bólkaliminum ella 2) hava livað saman við bólkaliminum í hjúnabandslíknandi samlívi á tí felags bústaðnum tey síðstu tvey árini innan andlátið.

## § 5. Innliman av tryggjaða

Stk. 1. Innliman í bólkalívsavtaluna við tilhoyrandi tryggingarfulnaðum er treytað av, at váðafrágreiðing, sum NordikLív metir er nøktandi, verður veitt, undir hesum upplýsingar um heilsustøðu. Ásetingarnar síggjast í bólkalívsavtaluni saman við treytunum fyri broytingum í avtalaða tryggingarfulnaðinum.

Stk. 2. Tryggingarfulnaðurin byrjar, tá NordikLív uttan fyrivarni hevur tikið við bólkalívstryggingini, uttan so at onnur dagfesting fyri gildiskomu er avtalað.

Stk. 3. Um tryggingartakarin ella tryggjaði geva NordikLív ósannar upplýsingar, tá partarnir verða innlimaðir í tryggingaravtaluna, ella tá tryggingarfulnaðurin verður broyttur, er rættarvirknaðurin sum nevnt í Tryggingaravtalulógini §§ 4 – 10.

## § 6. Undantøk

Stk. 1. Undir krígsstøðu, borgaraligum ófriði, uppreistri ella aðrari váðaøking av samsvarandi slagi á donskum/føroyskum øki fellur tryggingarfulnaðurin burtur. Avvarðandi danski ráðharrin tekur eftir tilmæli frá Fíggjareftirlitinum avgerð um, hvørt umrødda støða verður mett sum íkomin, og um so er, frá hvørjum degi byrjanin og endin á váðaøkingini skal roknast.

Stk. 2. Uttanfyri danskt/føroyskt øki gevur tryggingin ikki fulnað fyri óarbeiðsføri ella deyða, ið er ein avleiðing av virknari luttøku í kríggi, uppreistri ella líknandi virksemi.

## §§ 7 – 11. Serligar ásetingar fyri bólkalívsavtalur, ið fevna um útgjald fyri deyða, óarbeiðsføri, náddan aldur ella deyða/ bráðsjúku hjúnafelagans.

Ásetingarnar nevndar í §§ 7 – 11 verða bert nýttar, um tað stendur í bólkalívsavtaluni, at ein ella fleiri av hesum tryggingarfulnaðum eru avtalaðir.

## § 7. Útgjald um bólkalimurin doyr

Stk. 1. Fulnaður fyri deyða sambært bólkalívsavtaluni verður útgoldin, um bólkalimurin doyr í tryggingartíðini sambært § 3 e. Í bólkalívsavtaluni er tilskilað, hvussu fulnaðurin fyri deyða verður ávirkaður av møguligum útgjøldum orsakað av óarbeiðsføri bólkalimsins, bráðsjúku ella aldri.

Stk. 2. Uttan so at annað serliga er fráboðað NordikLív av bólkaliminum ella stendur í bólkalívsavtaluni, verður fulnaðurin fyri deyða útgoldin til "næstu avvarðandi" bólkalimsins sambært reglunum í Tryggingaravtalulógini § 105 a, um bólkalimurin bleiv fevndur av bólkalívsavtaluni **eftir 1. januar 2008**. "Næstu avvarðandi" eru hjúnafelagi bólkalimsins, ein sambúgvi, ið lýkur krøvini í stk. 3, børn, arvingar sambært testamenti ella arvingar sambært lógini.

Um bólkalimurin bleiv fevndur av bólkalívsavtaluni **fyri 1. januar 2008**, er sambúgvin bert fevndur av hugtakinum "næstu avvarðandi", um tað er avtalað við bólkalimin ella tryggingartakaran.

Stk. 3. Sambúgvi skal liva saman við bólkaliminum á felags bústaði og 1) vænta, hava ella hava havt eitt barn saman við bólkaliminum ella 2) hava livað saman við bólkaliminum í hjúnabandslíknandi samlívi á tí felags bústaðnum tey síðstu tvey árini innan andlátið.

Stk. 4. Rættindini til fulnað við deyða falla burtur, um eingin heimilaður er sambært serligum ásetingum um framíhjá-rættindi, ásetingum um framíhjárættindi í bólkalívsavtaluni, testamenti ella arvingar sambært lógini.

Stk. 5. Um fulnaður fyri deyða fevnir um barnaupphædd/ barnaveiting, sambært § 3 a, verða hesar veitingar útgoldnar sum ásett í bólkalívsavtaluni.

## § 8. Útgjald av óarbeiðsførisupphædd

Stk. 1. Óarbeiðsførisupphæddin verður útgoldin, um arbeiðsførleiki bólkalimsins í tryggingartíðini vegna sjúku ella vanlukku verður mettur sum varandi skerdur til minst helvtina ávikavist minst ein triðing, treytað av bólkalívsavtaluni. Um bólkalimurin við læknaviðgerð, umskúling, endur-venjing ella útbúgving kann fáa sín arbeiðsførleika upp um fyrrnevnda mark, eru treytirnar fyri útgjaldi ikki loknar.

Stk. 2. NordikLív metir um skerjingina av arbeiðsførleikanum við atliti til heilsustøðu bólkalimsins út frá eini læknaligari meting. NordikLív hevur rætt til at fáa til vega upplýsingar frá læknum, ið viðgera ella hava viðgjørt bólkalimin, og at lata bólkalimin kanna av einum lækna, ið NordikLív hevur valt.

Stk. 3. Útgoldin verður tann óarbeiðsførisupphæddin, ið var galdandi tann dagin, tá arbeiðsførleikin hjá bólkaliminum varð mettur at vera varnandi skerdur í tann mun, ið er nevndur í stk. 1.

Stk. 4. Rættindini til útgjald av óarbeiðsførisupphædd falla burtur, um bólkalimurin doyr, uttan so at bólkalimurin skriftliga hevur biðið NordikLív um útgjald og leyk treytirnar, nevndar í stk. 1, tá umbønin varð løgd fyri NordikLív.

Stk. 5. Er ein bólkalimur farin úr bólkalívsavtaluni, ella er bólkalívsavtalan endað sum avleiðing av uppsøgn ella av øðrum orsøkum, skal skriftlig áheitan um útgjald vera løgd fyri NordikLív innan 6 mánaðir, eftir at tryggingartíðin er útgingin, sambært § 3 e. Tá henda tíðarfreist gongur út, hevur bólkalimurin ikki longur rætt til útgjald av óarbeiðsføris-upphædd, ið ikki er fráboðað.

Stk. 6. Tá tann avtalaða óarbeiðsførisupphæddin er útgoldin, enda rættindi bólkalimsins til at fáa enn eitt útgjald fyri óarbeiðsføri.

## § 9. Útgjald av óarbeiðsførisveiting

Stk. 1. Óarbeiðsførisveitingin verður útgoldin, um arbeiðsførleiki bólkalimsins í tryggingartíðini vegna sjúku ella vanlukku verður mettur sum skerdur til minst helvtina, ávikavist minst ein triðing, treytað av bólkalívsavtaluni.

Stk. 2. Skerjingin sambært stk. 1 er til staðar, tá NordikLív metir, at bólkalimurin ikki longur er førur fyri – mett við atliti til núverandi heilsustøðu bólkalimsins, útbúgving og fyrrverandi yrki – at vinna meir enn ein triðing av tí, sum er vanligt fyri fult arbeiðsførar persónar við líknandi útbúgving og aldri.

Tá niðursetta arbeiðsførið hjá bólkaliminum verður mett fyrstu ferð, verður niðursetta arbeiðsførið mett í mun til núverandi yrkið hjá liminum. Um NordikLív metir, at bólkalimurin ikki kann fara aftur til núverandi yrkið í seinasta lagi 18 mánaðir eftir 1. sjúkradag, verður almenna arbeiðsførið mett. Almenna arbeiðsførið skal skiljast sum arbeiðsførið bæði í núverandi yrkinum hjá bólkaliminum og í øðrum yrkjum.

NordikLív hevur rætt til at fáa til vega upplýsingar frá læknum, ið viðgera ella hava viðgjørt bólkalimin, og at lata bólkalimin kanna av einum lækna, ið NordikLív hevur valt.

Stk. 3. Óarbeiðsførisveitingin verður útgoldin frá tí degi, tá arbeiðsførleikin hevur verið støðugt skerdur í 3 mánaðir, tó í fyrsta lagi frá tí degi, tá áheitanin um útgjald skriftliga verður løgd fyri NordikLív. Útgjaldið verður goldið frammanundan mánaðar-liga til bólkalimin, uttan so at annað er ásett í bólkalívsavtaluni.

Stk. 4. Útgjaldið heldur uppat, tá bólkalimurin hevur endurvunnið arbeiðsførleikan í ein so stóran mun, at nevndu fortreytir fyri útgjaldi ikki longur eru til staðar, tó í síðsta lagi tá bólkalimurin røkkur tí í bólkalívsavtaluni nevnda lokaaldrinum.

Stk. 5. Er ein bólkalimur farin úr bólkalívsavtaluni, ella er bólkalívsavtalan endað sum avleiðing av uppsøgn ella av øðrum orsøkum, skal skriftlig áheitan um útgjald vera løgd fyri NordikLív innan 6 mánaðir, eftir at tryggingartíðin er útgingin, sambært § 3 e. Tá henda freist gongur út, hevur bólkalimurin ikki longur rætt til útgjald av óarbeiðsførisveiting, ið ikki er fráboðað.

### § 10. Útgjald av Lokaupphædd

Stk. 1. Ein bólkalívsavtala, ið fevnir um lokaupphædd, gevur bert rætt til útgjald av tí avtalaðu lokaupphæddini, um bólkalimurin er innlimaður í bólkalívsavtaluna, áðrenn viðkomandi er fyltur 60 ár.

Stk. 2. Lokaupphæddin verður útgoldin til bólkalimin tíðarskeiðið ímillum tað 60. og 70. árið, ið er lokaaldur fyri limaskapin av bólkalívsavtaluni.

### § 11 A. Útgjald av Hjúnafelagafulnaði

Stk. 1. Fulnaður fyri deyða verður útgoldin, um hjúnafelagi bólkalimsins doyr í tryggingartíðini.

Stk. 2. Endar hjúnabandið sum avleiðing av sundurlesing ella hjúnaskilnaði, falla rættindini til útgjald við deyða hjúnafelagans burtur frá sundurlesingar- ella hjúnaskilnaðardegnum.

Stk. 3. Endar hjúnabandið sum avleiðing av deyða bólkalimsins áðrenn hjúnafelagan, falla rættindini til útgjald við deyða hjúnafelagans burtur, 30 dagar eftir deyða bólkalimsins.

Stk. 4. Fevnir bólkalívsavtalan um eina barnaupphædd við deyða hjúnafelagans, verður henda útgoldin sum ásett í bólkalívsavtaluni.

Stk. 5. Útgjøld við deyða hjúnafelagans verða útgoldin til bólkalimin. Útgjøld eftir deyða bólkalimsins, sambært stk. 3, verða goldin til næstu avvarðandi bólkalimsins.

Stk. 6. Hjúnafelagin kann ikki við gildi taka aftur ella broyta ásetingar í bólkalívsavtaluni um njótunartilskilan undir hjúnafelagafulnaðinum.

Stk. 7. Ásetingarnar nevndar omanfyri í stk. 4, 5, og 6 eru harumframt galdandi fyri samlív, tá reglurnar í § 4 eru loknar.

### § 11 B. Útgjald fyri bráðsjúku hjá hjúnafelaga bólkalimsins

Stk. 1. Tryggingarupphæddin verður útgoldin til hjúnafelaga bólkalimsins, tá viðkomandi í tryggingartíðini fær staðfest eina bráðsjúku, sambært § 2, stk. 3.

Stk. 2. Rættindi til útgjald falla burtur, um hjúnabandið endar sum avleiðing av sundurlesing ella hjúnaskilnaði.

Stk. 3. Endar hjúnabandið sum avleiðing av deyða bólkalimsins áðrenn hjúnafelagan, falla rættindini til útgjald burtur, 30 dagar eftir deyða bólkalimsins.

Stk. 4. Ásetingarnar nevndar omanfyri, eru harumframt galdandi fyri samlív, tá reglurnar í § 4 eru loknar.

### § 12. Fulnaður uttan tryggingargjald (Gjaldsundantøka)

Stk. 1. Fulnaðirnir nevndir í bólkalívsavtaluni í sambandi við deyða, óarbeiðsføri, bráðsjúku og hjúnafelagafulnað kunnu verða varðveittir uttan tryggingargjald, um bólkalimurin verður útlimaður úr bólkalívsavtaluni av tílíkum heilsuligum orsøkum, sum sambært § 9 geva rætt til útgjald av óarbeiðsførisveiting, um fulnaður uttan tryggingargjald er fevndur av bólkalívsavtaluni. Gjaldsundantøka kann verða varðveitt í upp til 3 ár, ávíkavist í mesta lagi til tryggingartíðarskeiðið er runnið, treytað av bólkalívsavtaluni.

Stk. 2. Rættindini til gjaldsfrían fulnað byrja frá fráfaringar-degnum og enda eftir 3 ár, ávíkavist tá tryggingartíðin gongur út, ella tá fortreytirnar, nevndar undir stk. 1 fyri fulnað uttan tryggingargjald, ikki longur eru loknar, um hetta hendir, áðrenn tryggingartíðin gongur út, ella tá bólkalimurin røkkur tí í bólkalívsavtaluni nevnda lokaaldrinum.

Stk. 3. Er tryggingartakarin ein felagskapur ella eitt yrkisfelag, byrja rættindini til gjaldsfrían fulnað tó í fyrsta lagi, frá tá bólkalimurin ikki hevur verið førur fyri at arbeiða í minsta lagi 3 mánaðir, og undir teirri fortreyt at bólkalimurin um hesa tíð framvegis er fevndur av bólkalívsavtaluni.

Stk. 4. Óarbeiðsføri hjá einum hjúnafelaga/sambúgva, ið er tryggjaður saman við bólkaliminum, gevur ikki rætt til gjaldsfrían fulnað í §§ 11 A og 11 B.

Stk. 5. Ein hjúnafelagi/sambúgvi, ið er vorðin bólkalimur, hevur ikki rætt til gjaldsfrían fulnað í sambandi við óarbeiðsføri..

Stk. 6. Er ein bólkalimur útlimaður úr bólkalívsavtaluni, ella er bólkalívsavtalan endað sum avleiðing av uppsøgn ella av øðrum orsøkum, skal skrivlig áheitan um fulnað uttan tryggingargjald vera løgd fyri NordikLív innan 6 mánaðir, eftir at tryggingartíðin er útgingin, sambært § 3 e. Tá henda freist gongur út, hevur bólkalimurin ikki longur rætt til gjaldsfrían fulnað, ið ikki er fráboðaður.

### § 13. Framhaldstrygging

Ein bólkalimur hevur rætt til at stovna framhaldstrygging í NordikLív uttan at veita nýggjar heilsuupplýsingar.
Treytirnar fyri framhaldstrygging eru at finna í "**Tryggingartreytir fyri framhaldstrygging**" hjá NordikLív.

### § 14. (Tóm)

### § 15. Uppsøgn av tryggingaravtaluni

Stk. 1. Tryggingaravtalan kann sigast upp av bæði tryggingar-takaranum og NordikLív við eini freist á 3 mánaðir til árslok.

Stk. 2. NordikLív kann broyta tryggingartreytirnar og tryggingargjaldið við eini freist á 3 mánaðir til árslok.

Stk. 3. Við broyting av tryggingartreytunum og við broyting í tryggingargjaldinum, ið bera við sær hægri tryggingargjald fyri bólkalívsavtaluna, hevur tryggingartakarin rætt til at siga tryggingaravtaluna upp við eini freist á 30 dagar, um uppsøgnin verður givin innan 30 dagar, eftir fráboðanina um broytingina.

### §. 16. Tryggingargjald og útrokning av tryggingar-gjaldinum

Stk. 1. Tryggingargjaldið verður ásett fyri eitt ár í senn. Tryggingargjaldið, ið vissa er veitt fyri (sáttmálagjaldið), verður ásett við støði í aldursbýtinum av teimum tryggjaðu og gjald-skránni hjá NordikLív, ið er fráboðað Tryggingareftirlitinum.

Stk. 2. Tryggingargjaldið fellur til gjaldingar fyrsta dag í hvørjum ásettum tryggingargjaldstíðarskeiði. Verður eitt tryggingargjald ikki goldið, heldur tryggingarfulnaðurin uppat innan eina neyvari ásetta freist, eftir at áminningin er givin.

### § 17. (Tóm)

### § 18. Bonus
Bonus verður tillutað, sambært teirri til eina og hvørja tíð galdandi bonusreglugerð, ið er fráboðað Tryggingareftirlitinum. Tá bonus verður útroknað, verða útreiðslur og tryggingargjaldið, ið vissa er veitt fyri, v.m. í tí av bólkinum goldna tryggingar-gjaldinum, drigin frá. Støddin á útreiðslunum og tryggingargjaldinum, ið vissa er veitt fyri, v.m. verða ásett av NordikLív sambært bonusreglugerðini.

### § 19. Skatta- og avgjaldsviðurskifti
NordikLív kann sambært galdandi lóg vera álagt at afturhalda skatta- og avgjaldsupphæddir við inn- og útgjald.

### § 20. Almennar reglur
Stk. 1. NordikLív hevur við eitt og hvørt útgjald rætt til at krevja at síggja skjalprógv, sum NordikLív metir er neyðugt. Sama skjalprógv kann krevjast sum fortreyt fyri veiting – ella framhaldandi varðveiting – av gjaldsfríum fulnaði sambært ásetingunum undir § 12.

Stk. 2. Bólkalívsavtalan kann hava ásetingar um útgjald av tryggingarfulnaðinum í gjøldum yvir í minsta lagi 10 ár fyri deyða ella óarbeiðsføri bólkalimsins. Um bólkalimurin doyr verða írestandi veitingarnar útgoldnar sambært teimum undir § 7 stk. 2 nevndu leiðreglum.

### § 21. Ræðisrættur
Stk. 1. Rættindi bólkalimanna sambært bólkalívsavtaluni kunnu ikki avhendast, veðsetast ella á annan hátt keypast, seljast ella leggjast fyri rættarsókn.

Stk. 2. Rættindi bólkalimanna sambært tryggingaravtaluni hava ikki við sær nakað krav um endurgjald (afturkeypsvirði) við útliman úr bólkalívsavtaluni.

### § 22. Lógargrundarlag og kærumøguleikar
Stk. 1. Vanligu ásetingarnar í føroyskum rættarreglum um tryggingaravtalur og føroysk lóggáva annars verður nýtt, í tann mun at ásetingarnar í tryggingaravtaluni ikki víkja frá lógini.

Stk. 2. NordikLív er limur í "Ankenævnet for Forsikring", sum viðger kærur frá brúkarum viðvíkjandi tryggingarmálum.

Stk. 3. Kærur til Ankenævnet skulu sendast inn á einum serligum oyðublaði. Oyðublaðið kann bíleggjast hjá NordikLív, skrivstovuni hjá Ankenævnet, Forbrugerrådet ella Forsikringsoplysningen.

Stk. 4. Tá kæran verður latin inn, skal eitt ómaksgjald, sum Ankenævnet hevur ásett, gjaldast. Fær kærarin heilt ella partvíst viðhald í kæruni, verður ómaksgjaldið afturgoldið av Ankenævnet.

**Hesar treytir eru bæði at finna á føroyskum og á donskum. Um tað er ósamsvar millum føroysku og donsku útgávurnar, er tað tann danska útgávan, ið er galdandi.**

# Forsikringsbetingelser for Gruppelivsforsikring

**Forsikringsbetingelserne gælder fra 1. marts 2017og erstatter tidligere betingelser af 1. september 2016**

### § 1. Forsikringsaftalen
Stk. 1. Forsikringsaftalen består af gruppelivsaftalen og nedenstående forsikringsbetingelser.

Stk. 2. Forsikringsbetingelserne kan være fraveget ved bestemmelser, der er anført i gruppelivsaftalen, og som er aftalt mellem NordikLív og forsikringstageren, jf. § 3 d.

Stk. 3. Lov om forsikringsaftaler gælder som supplerende aftalegrundlag, hvis loven ikke er fraveget ved bestemmelser i forsikringsaftalen.

### § 2. Gruppelivsaftalen
Stk. 1. Gruppelivsaftalen indeholder de overordnede bestemmelser om de forsikrede/gruppemedlemmerne, disses indtræden og udtræden af ordningen samt forsikringsdækningens omfang m.v.

Stk. 2. Gruppelivsaftalen kan omfatte følgende:
- a) Dækning ved gruppemedlemmets død, jf. § 7.
- b) Dækning ved gruppemedlemmets invaliditet, jf. §§ 8 og 9.
- c) Dækning ved gruppemedlemmets alderspensionering, jf. § 10.
- d) Dækning ved gruppemedlemmets ægtefælles død (ægtefælledækning), jf. § 11 A.
- e) Dækning ved gruppemedlemmets kritiske sygdom, jf. stk. 3.
- f) Dækning ved gruppemedlemmets ægtefælles kritiske sygdom, jf. stk. 3 og § 11 B.
- g) Dækning ved gruppemedlemmets børns kritiske sygdom, jf. stk. 4 og § 3 b.
- h) Dækning ved gruppemedlemmets børns død, jf. stk. 4 og § 3 b.
- i) Dækning ved gruppemedlemmets børns diabetes type 1, jf. stk. 4 og § 3 b.

Stk. 3. Kritisk sygdom dækkes efter NordikLívs bestemmelser om: **„Dækning ved visse kritiske sygdomme"**, der udleveres som et tillæg til gruppelivsaftaler, der omfatter kritisk sygdom.

Stk. 4. Dækning ved kritisk sygdom til børn, dækning ved børns død og dækning ved børns diabetes type 1, dækkes efter NordikLívs bestemmelser om: **"Dækning til børn ved visse kritiske sygdomme"**. Forsikringsbetingelserne udleveres som et tillæg til gruppelivsaftaler, der omfatter dækning ved børns kritiske sygdom.

### § 3. Betydningen af udtryk anvendt i forsikringsaftalen
*a) Børn omfattet af børnesum/børnerente*
Gruppemedlemmets biologiske børn og adoptivbørn samt ægtefælles biologiske børn og adoptivbørn. Ligestillet hermed

er en samlevers biologiske børn og adoptivbørn, når betingelserne under § 4 er opfyldt.

Det er en forudsætning, at gruppelivsaftalen indeholder bestemmelse om udbetaling af børnesum/børnerente.

Retten til børnesum/børnerente for et barn, der ikke er gruppemedlemmets biologiske barn eller adoptivbarn, bortfalder ved separation eller skilsmisse, eller når et af § 4 omfattet samlivsforhold anses for afbrudt.

Retten påvirkes ikke af, at ægteskabet/samlivsforholdet er ophørt som følge af dødsfald. Retten til børnesum/børnerente under en eventuel ægtefælledækning indtræder og ophører efter bestemmelserne i § 11 A.

*b) Børn omfattet af dækning ved kritisk sygdom, dødsfald og diabetes type 1*
Gruppemedlemmets biologiske børn og adoptivbørn samt ægtefælles/samlevers biologiske børn og adoptivbørn.

Det er en forudsætning, at gruppelivsaftalen indeholder bestemmelse om udbetaling af sum ved barnets kritiske sygdom hhv. dækning ved barnets død og/eller dækning ved barnets diabetes type 1.

Det er en betingelse for dækning af ægtefælles/samlevers biologiske børn eller adoptivbørn, at ægtefællen/samleveren og barnet lever sammen med gruppemedlemmet på fælles bopæl på diagnosetidspunktet for barnets kritiske sygdom/tidspunktet for barnets død og har gjort det i mindst 6 måneder forud for diagnosetidspunktet/dødsfaldstidspunktet.

Retten til udbetaling bortfalder ved separation eller skilsmisse.

*c) Forsikrede*
Det gruppemedlem på hvis liv og helbred forsikringen oprettes, eller dennes ægtefælle/samlever eller barn, såfremt det er aftalt, at forsikringen omfatter disse.

*d) Forsikringstageren*
Den virksomhed, forening, organisation eller lignende, som NordikLív har indgået forsikringsaftalen med.

NordikLív kan med fuld gyldighed for gruppemedlemmerne træffe aftale med forsikringstageren om alle spørgsmål vedrørende forsikringsaftalen. Det enkelte gruppemedlem, jf. pkt. f, er dog berettiget til at aftale individuelle bestemmelser med NordikLív om begunstigelse.

*e) Forsikringstiden*
Omfatter perioden fra gruppemedlemmets respektive medforsikrede ægtefælles/samlevers/barns indtræden under gruppelivsaftalen og indtil udtræden sker efter forsikringsaftalens bestemmelser, eller som følge af gruppelivsaftalens ophør eller individuelt ifølge aftale.

*f) Gruppemedlemmerne*
De personer, der ifølge gruppelivsaftalen mellem NordikLív og forsikringstageren er indtrådt i gruppelivsaftalen som ejere af den aftalte forsikringsdækning.

*g) Samliv/samlever*
Omfatter såvel samliv mellem personer af samme køn som samliv mellem personer af forskelligt køn, når der ikke foreligger ægteskabshindring.

*h) Ægteskab/ægtefælle*
Omfatter tillige registreret partnerskab/registreret partner.

## § 4. Samlivsforhold ved ægtefælledækning/børnesum/børnerente

Stk. 1. Gruppemedlemmets samlever er omfattet af en gruppelivsaftales ægtefælledækning, og samleverens biologiske børn og adoptivbørn er omfattet af en gruppelivsaftales børnesum/børnerente, hvis betingelserne i stk. 2 er opfyldt:

Stk. 2. Samlever skal leve sammen med gruppemedlemmet på fælles bopæl og 1) vente, have eller have haft et barn sammen med gruppemedlemmet eller 2) have levet sammen med gruppemedlemmet i et ægteskabslignende forhold på den fælles bopæl i de sidste 2 år før dødsfaldet.

## § 5. Indtræden af forsikrede

Stk. 1. Indtræden under gruppelivsaftalens forsikringsdækninger er betinget af, at der gives – efter NordikLívs skøn – tilfredsstillende risikooplysninger, herunder oplysning om helbredsforhold. Bestemmelserne fremgår af gruppelivsaftalen tillige med betingelserne for ændringer i den aftalte forsikringsdækning.

Stk. 2. Forsikringsdækningen begynder, når NordikLív uden forbehold har antaget gruppelivsforsikringen, medmindre anden ikrafttrædelsesdato er aftalt.

Stk. 3. Hvis forsikringstageren eller forsikrede giver NordikLív urigtige oplysninger ved indtræden under forsikringsaftalen eller ved ændring af forsikringsdækningen, er retsvirkningerne som anført i Forsikringsaftalelovens §§ 4 - 10.

## § 6. Undtagen risiko

Stk. 1. Under krigstilstand, borgerlige uroligheder, oprør eller anden fareforøgelse af tilsvarende art på dansk/færøsk område bortfalder forsikringsdækningen. Ressortministeren træffer efter indstilling fra Finanstilsynet bestemmelse om, hvorvidt den omtalte tilstand skal anses for indtrådt og i bekræftende fald om det tidspunkt, hvorfra fareforøgelsens indtræden og ophør skal regnes.

Stk. 2. Uden for dansk/færøsk område dækker forsikringen ikke invaliditet eller dødsfald, der er en følge af aktiv deltagelse i krig, oprør eller lignende operation.

## §§ 7 – 11. Særlige bestemmelser for gruppelivsaftaler, der omfatter udbetaling ved død, invaliditet, opnået alder eller ægtefællens død/kritiske sygdom

De i §§ 7 - 11 anførte bestemmelser finder kun anvendelse, hvis det fremgår af gruppelivsaftalen, at en eller flere af disse forsikringsdækninger er aftalt.

## § 7. Udbetaling ved gruppemedlemmets død

Stk. 1. Gruppelivsaftalens dødsfaldsdækning udbetales, hvis gruppemedlemmet afgår ved døden i forsikringstiden, jf. § 3 e. Det fremgår af gruppelivsaftalen, hvordan dødsfaldsdækningen påvirkes af eventuelle udbetalinger, der er en følge af gruppemedlemmets invaliditet, kritisk sygdom eller alder.

Stk. 2. Medmindre andet særligt er meddelt NordikLív af gruppemedlemmet eller fremgår af gruppelivsaftalen, udbetales dødsfaldsdækningen til gruppemedlemmets "nærmeste pårørende“ efter reglerne i Forsikringsaftalelovens § 105 a, såfremt gruppemedlemmet er blevet omfattet af gruppelivsaftalen **efter 1. januar 2008**. "Nærmeste pårørende" er gruppemedlemmets ægtefælle, en samlever, der opfylder kravene i stk. 3, børn, arvinger ifølge testamente eller arvinger ifølge loven.

Såfremt gruppemedlemmet er blevet omfattet af gruppelivsaftalen **før 1. januar 2008**, er samlever kun omfattet af begrebet "nærmeste pårørende", hvis det er aftalt med gruppemedlemmet eller forsikringstageren.

Stk. 3. Samlever skal leve sammen med gruppemedlemmet på fælles bopæl og 1) vente, have eller have haft et barn sammen med gruppemedlemmet eller 2) have levet sammen med

gruppemedlemmet i et ægteskabslignende forhold på den fælles bopæl i de sidste 2 år før dødsfaldet.

Stk. 4. Retten til dødsfaldsdækning bortfalder, hvis der ikke findes en berettiget ifølge særlig begunstigelsesbestemmelse, gruppelivsaftalens begunstigelsesbestemmelse, testamente eller legale arvinger.

Stk. 5. Omfatter dødsfaldsdækningen børnesum/børnerente, jf. § 3 a, sker udbetaling af disse ydelser som bestemt i gruppelivsaftalen.

### § 8. Udbetaling af Invalidesum

Stk. 1. Invalidesummen udbetales, hvis gruppemedlemmets erhvervsevne i forsikringstiden på grund af sygdom eller ulykke skønnes varigt nedsat til mindst halvdelen hhv. til mindst en tredjedel, afhængig af gruppelivsaftalen. Såfremt gruppemedlemmet ved lægebehandling, omskoling, genoptræning eller uddannelse kan bringe sin erhvervsevne over førnævnte grænse, er betingelserne for udbetaling ikke opfyldt.

Stk. 2. Nedsættelsen af erhvervsevnen bedømmes af NordikLív under hensyn til gruppemedlemmets helbredsmæssige forhold ud fra en ren lægelig vurdering. NordikLív er berettiget til at indhente oplysninger fra læger, der behandler eller har behandlet gruppemedlemmet, og til at lade gruppemedlemmet undersøge af en af NordikLív valgt læge.

Stk. 3. Udbetalingen omfatter den invalidesum, der var gældende den dag, hvor gruppemedlemmets erhvervsevne blev skønnet varigt nedsat i det i stk. 1 nævnte omfang.

Stk. 4. Retten til udbetaling af invalidesum bortfalder ved gruppemedlemmets død medmindre gruppemedlemmet skriftligt har bedt om udbetaling over for NordikLív og på dette tidspunkt opfyldte betingelserne anført under stk. 1.

Stk. 5. Er et gruppemedlem udtrådt af gruppelivsaftalen, eller er gruppelivsaftalen ophørt som følge af opsigelse eller af andre grunde, skal skriftlig anmodning om udbetaling være fremsat over for NordikLív inden 6 måneder efter udløbet af forsikringstiden, jf. § 3 e. Ved udløbet af denne tidsfrist bortfalder retten til udbetaling af invalidesum for invaliditet, der ikke er anmeldt.

Stk. 6. Når den aftalte invalidesum er udbetalt, ophører gruppemedlemmets ret til yderligere udbetaling af invalidesum.

### § 9. Udbetaling af Invaliderente

Stk. 1. Invaliderenten udbetales, hvis gruppemedlemmets erhvervsevne i forsikringstiden på grund af sygdom eller ulykke skønnes nedsat til mindst halvdelen hhv. til mindst en tredjedel, afhængig af gruppelivsaftalen.

Stk. 2. Nedsættelsen efter stk. 1 foreligger, når gruppemedlemmet efter NordikLívs skøn ikke længere er i stand til – bedømt under hensyn til gruppemedlemmets nuværende helbredstilstand, uddannelse og tidligere beskæftigelse - at tjene mere end en tredjedel af, hvad der er sædvanligt for fuldt erhvervsdygtige personer med lignende uddannelse og alder.

Ved første vurdering af gruppemedlemmets nedsatte erhvervsevne, vurderes den nedsatte erhvervsevne i gruppemedlemmets nuværende erhverv. Hvis FG vurderer, at gruppemedlemmet ikke kan vende tilbage til nuværende erhverv, senest 18 måneder efter 1. sygedag, vurderes den generelle erhvervsevne. Ved den generelle erhvervsevne forstås erhvervsevnen i både gruppemedlemmets nuværende erhverv og i andre erhverv.

NordikLív er berettiget til at indhente oplysninger fra læger, der behandler eller har behandlet gruppemedlemmet, og til at lade gruppemedlemmet undersøge af en af NordikLív valgt læge.

Stk. 3. Invaliderenten udbetales fra den dato, hvor erhvervsevnen har været nedsat uafbrudt i 3 måneder, dog tidligst fra den dato, hvor anmodning om udbetaling skriftligt fremsættes overfor NordikLív. Udbetalingen sker månedsvis forud til gruppemedlemmet, medmindre andet er bestemt i gruppelivsaftalen.

Stk. 4. Udbetalingen ophører, når gruppemedlemmets erhvervsevne er genvundet i en sådan grad, at de anførte forudsætninger for udbetaling ikke længere er til stede, dog senest når gruppemedlemmet opnår den i gruppelivsaftalen anførte ophørsalder.

Stk. 5. Er et gruppemedlem udtrådt af gruppelivsaftalen, eller er gruppelivsaftalen ophørt som følge af opsigelse eller af andre grunde, skal skriftlig anmodning om udbetaling være fremsat over for NordikLív inden 6 måneder efter udløbet af forsikringstiden, jf. § 3 e. Ved udløbet af denne frist bortfalder retten til udbetaling af invaliderente for invaliditet, der ikke er anmeldt.

### § 10. Udbetaling af Udløbssum

Stk. 1. En gruppelivsaftale, der omfatter udløbssum, giver kun ret til udbetaling af den aftalte udløbssum, hvis gruppemedlemmet er indtrådt i gruppelivsaftalen inden det fyldte 60. år.

Stk. 2. Udløbssummen udbetales til gruppemedlemmet på det tidspunkt mellem det 60. og 70. år, som er ophørsalder for medlemskab af gruppelivsaftalen.

### § 11 A. Udbetaling af Ægtefælledækning

Stk. 1. Dødsfaldsdækningen udbetales, når gruppemedlemmets ægtefælle dør i forsikringstiden.

Stk. 2. Ophører ægteskabet som følge af separation eller skilsmisse, bortfalder retten til udbetaling ved ægtefællens død fra separationens eller skilsmissens dato.

Stk. 3. Ophører ægteskabet som følge af gruppemedlemmets død før ægtefællen, bortfalder retten til udbetaling ved ægtefællens død, når der er forløbet 30 dage fra gruppemedlemmets død.

Stk. 4. Omfatter gruppelivsaftalen en børnesum ved ægtefællens død, udbetales denne som bestemt i gruppelivsaftalen.

Stk. 5. Udbetalinger ved ægtefællens død sker til gruppemedlemmet. Udbetalinger efter gruppemedlemmets død, jf. stk. 3, sker til gruppemedlemmets nærmeste pårørende.

Stk. 6. Ægtefællen kan ikke gyldigt tilbagekalde eller ændre gruppelivsaftalens bestemmelser om begunstigelse under ægtefælledækningen.

Stk. 7. Bestemmelserne anført ovenfor i stk. 4, 5, og 6 gælder tillige samlivsforhold, når reglerne i § 4 er opfyldt.

### § 11 B. Udbetaling ved gruppemedlemmets ægtefælles kritiske sygdom

Stk.1. Forsikringsdækningen udbetales til gruppemedlemmets ægtefælle, når denne får konstateret en kritisk sygdom, jf. § 2, stk. 3, i forsikringstiden.

Stk. 2. Retten til udbetaling bortfalder ved ægteskabets ophør som følge af separation eller skilsmisse.

Stk. 3. Ophører ægteskabet som følge af gruppemedlemmets død før ægtefællen, bortfalder retten til udbetaling, når der er forløbet 30 dage fra gruppemedlemmets død.

Stk. 4. Bestemmelserne anført ovenfor, gælder tillige samlivsforhold, når reglerne i § 4 er opfyldt.

### § 12. Præmiefri dækning

Stk. 1. De i gruppelivsaftalen anførte dækninger ved død, invaliditet, kritisk sygdom og ægtefælledækning kan opretholdes uden præmiebetaling, hvis gruppemedlemmet udtræder af gruppelivsaftalen af sådanne helbredsmæssige årsager, som ifølge § 9 giver ret til udbetaling af invaliderente, hvis præmiefri dækning er omfattet af gruppelivsaftalen. Præmiefri dækning kan opretholdes i indtil 3 år hhv. maksimalt til forsikringstidens udløb, afhængig af gruppelivsaftalen.

Stk. 2. Retten til præmiefri dækning indtræder fra fratrædelsesdatoen og ophører efter 3 år henholdsvis ved forsikringstidens udløb eller på det tidligere tidspunkt, hvor de under stk.1 anførte forudsætninger for præmiefri dækning ikke længere er opfyldt, eller gruppemedlemmet opnår den i gruppelivsaftalen anførte ophørsalder.

Stk. 3. Er forsikringstageren en forening eller en organisation, indtræder retten til præmiefri dækning dog først fra det tidspunkt, hvor erhvervsudygtigheden har varet i mindst 3 måneder, og under forudsætning af, at gruppemedlemmet på dette tidspunkt fortsat er omfattet af gruppelivsaftalen.

Stk. 4. En forsikret ægtefælles/samlevers erhvervsudygtighed giver ikke ret til præmiefri dækning for dækningerne i §§ 11 A og 11 B.

Stk. 5. En ægtefælle/samlever der er indtrådt som gruppemedlem, har ikke ret til præmiefri dækning ved erhvervsudygtighed.

Stk. 6. Er et gruppemedlem udtrådt af gruppelivsaftalen, eller er gruppelivsaftalen ophørt som følge af opsigelse eller af andre grunde, skal skriftlig anmodning om præmiefri dækning være fremsat overfor NordikLív inden 6 måneder efter udløbet af forsikringstiden, jf. § 3 e. Ved udløbet af denne frist bortfalder retten til præmiefri dækning, der ikke er anmeldt.

### § 13. Fortsættelsesforsikring

Stk. 1. Et gruppemedlem er berettiget til at oprette fortsættelsesforsikring i NordikLív uden afgivelse af helbredsoplysninger. Vilkårene for fortsættelsesforsikring findes i NordikLívs "**Forsikringsbetingelser for fortsættelsesforsikring**".

### § 14. (Tom)

### § 15. Opsigelse af forsikringsaftalen

Stk. 1. Forsikringsaftalen kan opsiges såvel af forsikringstageren som af NordikLív med 3 måneders varsel til udgangen af et kalenderår.

Stk. 2. NordikLív kan ændre forsikringsbetingelser og tarif med 3 måneders varsel til udgangen af et kalenderår.

Stk. 3. Ved ændring af forsikringsbetingelser og ved tarifændringer, som medfører højere præmie for gruppelivsaftalen, er forsikringstageren berettiget til at opsige forsikringsaftalen med 30 dages varsel, når opsigelsen finder sted inden 30 dage efter meddelelsen om ændringen.

### § 16. Præmiebetaling og præmieberegning

Stk. 1. Præmien fastsættes for et år ad gangen. Den garanterede præmie (tarifpræmien) fastsættes på baggrund af aldersfordelingen for de forsikrede og NordikLívs tariffer, der er anmeldt til Finanstilsynet.

Stk. 2. Præmien forfalder til betaling den første dag i hver aftalt præmiebetalingsperiode. Betales en præmie ikke, ophører forsikringsdækningen inden for en nærmere angivet frist efter, at påmindelse har fundet sted.

### § 17. (Tom)

### § 18. Bonus

Bonus tildeles efter det til enhver tid gældende bonusregulativ, der er anmeldt til Finanstilsynet. Ved beregningen af bonus fratrækkes omkostninger og garantipræmie m.v. i den af gruppen betalte præmie. Størrelsen af omkostninger og garantipræmie m.v. fastsættes af NordikLív i henhold til bonusregulativet.

### § 19. Skatte- og afgiftsforhold

NordikLív kan efter lovgivningen være pålagt at tilbageholde skatte- og afgiftsbeløb ved ind- og udbetalinger.

### § 20. Generelle regler

Stk. 1. NordikLív er ved enhver udbetaling berettiget til at kræve forevist dokumentation, som er nødvendig efter NordikLívs skøn. Samme dokumentation kan kræves som forudsætning for ydelse - eller fortsat opretholdelse - af præmiefri dækning efter bestemmelserne under § 12.

Stk. 2. Gruppelivsaftalen kan indeholde bestemmelser om udbetaling af forsikringsdækningen i rater over mindst 10 år ved gruppemedlemmets død eller invaliditet. Ved gruppemedlemmets død udbetales de resterende ydelser efter de under § 7 stk. 2 anførte retningslinier.

### § 21. Rådighedsforhold

Stk. 1. Gruppemedlemmernes rettigheder efter gruppelivsaftalen kan ikke afhændes, pantsættes eller på anden måde gøres til genstand for omsætning eller retsforfølgning.

Stk. 2. Gruppemedlemmernes rettigheder efter forsikringsaftalen indebærer ikke noget krav på en kontant godtgørelse (tilbagekøbsværdi) ved udtræden af gruppelivsaftalen.

### § 22. Lovvalg og klageadgang

Stk. 1. Dansk rets almindelige bestemmelser om forsikringsaftaler, samt dansk lovgivning i øvrigt, finder anvendelse i det omfang denne lovgivning ikke er fraveget ved bestemmelser i forsikringsaftalen.

Stk. 2. NordikLív er tilsluttet **"**Ankenævnet for Forsikring", som behandler klager fra forbrugerne vedrørende forsikringsforhold.

Stk. 3. Klager til Ankenævnet skal indsendes på et særligt klageskema. Skemaet kan rekvireres hos NordikLív, Ankenævnets sekretariat, Forbrugerrådet samt Forsikringsoplysningen.

Stk. 4. Når klagen indleveres, skal der betales et gebyr fastsat af Ankenævnet. Får klageren helt eller delvist medhold i klagen, tilbagebetaler Ankenævnet gebyret.

**Disse betingelser findes både på dansk og færøsk. Skulle der være uoverensstemmelse mellem den danske og færøske version, er det den danske version, der er gældende.**